YRKIS depilin
Læra fyri lívið

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H.Schrøtersgøta 7
Postboks 3279
FO-110 Tórshavn

31. januar 2024
Mál:24/02585

Hoyringssvar til lógaruppskot um føroyskan førleikakarm

Yrkisdepilin hevur fingið uppskot til løgtingslóg um føroyskan førleikakarm til hoyringar og hevur hesar viðmerkingar:

Yrkisdepilin heftir seg við, at ætlanin er at hava sjey førleikastig, hóast tann europæiski (EQF) hevur átta stig (§ 4, stk. 1). Yrkisdepilin skilur grundgevingina, men heldur tó, at tað kunnu vera vansar við hesi avgerð, og at tað er betur at hava sama tal av førleikastigum. Fyri stóran part av yrkisútbúgvingunum er galdandi, at hesar virka eftir donskum lógarverki og tá má hugsast um, hvussu hetta skal gerast tá stigini ikki eru tey somu í danska og føroyska førleikakarminum.

Lógaruppskotið ásetur, at førleikar eru stigvísir og byggja á vitan, hegni og førleikar, men eingin nærri allýsing av hesum hugtøkum er í lógaruppskotinum (§ 4, stk. 2). Yrkisdepilin hevur skilt, at ein serskilt frágreiðing greinar tað nærri, men tað stendur einki um tað í lógaruppskotinum, tvs. hvat er grundarlagið fyri, hvat hesi hugtøkini merkja, og hvussu tey skulu nýtast. Yrkisdepilin vil hervið vísa á, at tað má vera greitt í lógaruppskotinum, hvat hugtøkini merkja.

Tað sum Yrkisdepilin tó serliga heftir seg við, er parturin um flokking av útbúgvingum (§ 5, stk. 2). Lógaruppskotið sigur einki um, hvørji atlit skulu takast, tá ið ein útbúgving skal flokkast og sigur einki um tey umfatandi dokumentatiónskrøvini, sum jú altjóða eru galdandi, tá ið ein útbúgving skal flokkast eftir einum førleikakarmi. Í hesum sambandi skal Yrkisdepilin eisini vísa á, at yrkisútbúgvingar ikki er EIN útbúgving, men eitt fleirtal av útbúgvingum við ymiskum skúlaskeiðum og ymiskari longd, ið skulu dokumenterast og flokkast hvør sær. Enn er skjøtul ikki settur á arbeiðið at dokumentera, hvørjar førleikar hvør einstøk yrkisútbúgving gevur, sambært leistinum við vitan, hegni og førleikum. Tað er sostatt ikki rætt, at uppskotið ikki hevur umsitingarligar avleiðingar. Tað er eitt stórt arbeiði, sum skal gerast, um yrkisútbúgvingar skulu flokkast og lúka dokumentatiónskrøvini. Arbeiðið krevur nógv samstarv við arbeiðsmarknaðarpartarnar og hetta útloysir eyka arbeiðið og útreiðslur fyri Yrkisdepilin.

Hoydalsvegur 1
FO-100 Tórshavn
+298 30 65 60
yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo
yrkisdepilin.fo

Í viðmerkingunum (undir 2.14) stendur, at lógaruppskotið leggur onga heimild til undirliggjandi stovn ella kommunur. Yrkisdepilin vil hervið minna á, at yrkisútbúgvingarlógin greitt ásetur, at landsstýrismaðurin bert kann góðkenna útbúgvingar eftir tilmæli frá ráðsskipanini, og harafturat er tað yrkisnevndin sum góðkennur námsskipanirnar og ikki landsstýrismaðurin.

Blíðar heilsur

Randi Frederiksberg

Leiðari / Manager

YRKIS depilin

Hoydalsvegur 1 · FO-100 Tórshavn

+298 21 20 00 · randif@yrkisdepilin.fo · **yrkisdepilin.fo**